2 ´arin Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Morten Korch til Saudi-Arabia

**SJÓNVARP.** Av øllum hugsandi londum hevur Saudi-Arabia júst keypt donsku sjónvarpssendirøðina, sum Lars von Trier hevur gjørt eftir Morten Korch. Talan er um eina sendirøð í røttum donskum anda.

Røðin um lívið í Stillebækken, sum eisini hevur verið at sæð í føroyskum sjónvarpi, gongur eftir øllum at døma ígjøgnum sensurin í Saudi-Arabia.

Annars eru evni sum kynslív og átrúnaður ikki nakað, sum verður sent í sjónvarpinum í Saudi-Arabia, men romantikkurin og familjustríðini í Morten Korch-sendirøðini kunnu gerast vælumtókt í miðeystri, halda summi.

Í Saudi-Arabia verða røddir lagdar út yvir danska málið, og sendirøðin fer at ganga undir navninum Quiet Water.



# 100.000 krónur fyri handrit

Hálvan august í ár er seinasta freist at lata inn handrit til handritakappingina, sum Leikpallur Føroya skrivaði út fyrraárið.

Tað falla 100.000 krónur í lut til tað handritið, sum dómsnevndin heldur vera tað besta.

Stýrið fyri Leikpall Føroya útskrivaði kappingina, tí tey halda, at tørvur er á nýggjum føroyskum uppruna-leikum – bæði fyri at lýsa støðuna í samafelagnum í dag og fyri at viðgera evni úr fortíðini.

Dómsnevndin, sum skal meta um handritini, er broytt nakað. Í dag eru hesi í nevndini: Vár Jacobsen, dramaturgur, Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum og Olaf Johannessen, sjónleikari í Kongaliga Sjónleikarhúsinum í Keypamannahavn.

Sum íblástur hevur Leikpallur Føroya saman við Rithøvundafelag Føroya skipa fyri skeiðum í at skriva dramatikk.

# A.P. Møller úr Berlingske

**FJØLMIÐLAR.** A.P. Møller fyritøkan er ikki longur ein av partaeigarunum í Berlingske Tidende. Sambært danska blaðnum Jyllands-Posten hevur A.P. Møller selt tey umleið 14%, sum felagið átti í Berlingske Officin.

Berlingske Officin gevur millum annað bløð út, og tað sigst, at felagið eigur í 2/3 av donsku dagbløðunum. Ónevndar keldur siga fyri Jyllands-Posten, at partabrøvini hjá A.P. Møller eru seld Den Danske Bank og norsku fyritøkuni Orkla, sum frammanundan gevur bløð út í Noregi, Svøríki og Pøllandi.

- Hetta er fyrstu ferð, at ein reint kapitalistiskur eigari fer at brúka partapeningin til at vinna pengar og at fáa sær upplýsingar um tað, sum fer fram í Berlingske, sigur Jørgen Poulsen, sum er fjølmiðlagranskari, vísandi til Orkla.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Tue 11. Apr. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** arnigreg@post10.tele.dk
**Reply to:** arnigreg@post10.tele.dk

TELDU-POSTURIN

# Brennivínið er svikaligt

Øl og brennivín hava alstóran týdning fyri álendingar. Ikki tí teir drekka so ovurhonds nógv, men tí at samfelagið fær ein stóran part av sínum inntøkum frá tollfríari sølu av alkoholvørum.

At svenskarar nú í nærmastu framtíð fáa størri atgongd til bíligt rúsdrekka úr øðrum ES-londum, og svensku rúsdrekkaavgjøldini samstundis lækka munandi, skapar tí ikki sørt av órógv á Álandi.

Tey stóru ferjureiðaríini fáa megin-partin av sínum inntøkum frá tax-free sølu, og soleiðis kunnu ferðaseðlaprísirnir haldast á einum sera lágum støði. Hetta lokkar hvørt ár milliónir av svenskarum og finnlendingum umborð á tær stóru ferjurnar, sum sigla í fastari rutu millum Svøríki og Finland. Áland slapp sum einasta øki innan ES at varðveita skattafría sølu eftir 1. juli í fjør, og hetta hevur gjørt tað áhugavert hjá bæði álendskum og útlendskum reiðaríum at lata skipini leggja at í Álandi á leiðini millum Svøríki og Finland. Av hesum áðum hava umleið 9 milliónir ferðafólk lagt leiðina fram við Álandi seinasta árið.

Og hetta fyrsta árið tykist skattaundantakið mótvegis EU at hava givið Álandi ein veldugan fyrimun í tí hørðu kappingini innan ferðamannaskipavinnuna í Eystursjónum.

Skattafría sølan hevur higartil verið ein sera góð forrætning fyri ferjureiðaríini. Prísirnir í tax-free handlunum umborð liggja í miðal bert eini 20-25% undir prísunum í almennu rúsdrekkasølunum í Svøríki og Finlandi, og vinningurin hjá reiðaríunum er tí ógvuliga stórur.

Men nú eru álendingarnir vaknaðir sum við kaldan dreym av gongdini í grannalondunum.

Fyrr lítlum mánaði síðani gjørdu Svøríki og ES semju um, hvussu Svøríki skal laga sínar reglur fyri innflyting av rúsdrekka eftir restini av ES. Ár 2004 sleppa svenskarar at innflyta stórar nøgdir av bíligum øli, víni og brennivíni úr øðrum ES-londum, eitt nú Danmark og Týsklandi. Talan verður um 10 litrar av brennivíni og 100 litrar av øli og víni. Longu 1. juli í ár fleirfaldast nøgdirnar av øli og víni. Finland hevdi longu frammanundan gjørt avtalu um somu tillagingargongd.

Svenska stjórnin hevur kunngjørt, at Svøríki fer at lækka rusdrekkaavgjøldini munandi fyri at Systembolaget, almenna svenska rúsdrekkasølan, ikki skal fara til grundar í kappingini.

Hetta merkir at ferðavinnureiðaríini eisini mugu fylgja við og lækka sínar prísir. Reiðaríini eru komin við varisligum metingum um, at so fer helst at vera.

Men týsdagin kom so tann fyrsta veruliga bumban. Størsta álendska reiðaríið, Viking Line, boðaði frá, at tað fer helst at flyta tvey av størstu skipum sínum undir annað flagg 1. januar næsta ár. Væntandi minking í vinninginum ger tað neyðugt at minka um rakstrarútreiðslurnar. Hetta seinna, rakstrarútreiðslunar hjá reiðaríunum, hevur verið ein nógv umrøddur spurningur seinastu árini.

Finsk og álendsk reiðarí eru fíggjarliga tyngd av, at Finland ikki hevur gjørt sínar skattareglur fyri sjóvinnuna so lagaligar, sum ES loyvir, og at Finland ikki heldur hevur eina nettolønarskipan fyri sjómenn, eins og vit kenna tað eitt nú í Danmark.

Reaktiónirnar hava verið ymiskar eftir útspælið frá Viking Line.

Ein leiðari í blaðnum Nya Åland staðfestir turt at... "Trúskapinum hjá stórfyritøkum skal ein ongantíð rokna við. Tær flyta eftir pengunum, tað er bara so og er einki at moralisera um". Tað sum hevur týdning nú, verður víðari sagt í hesum leiðara, er at byrja at gera sær hugmyndir um, hvussu Áland skal klára seg vinnuliga eftir 2004. "Hvar eru visiónirnar um, hvussu Áland skal varðveita sína vælferð uttan sprittið sum smyrjievni?"

Løgmaður, ella Lantrådet sum heitið er her, sigur í eini yvirskrift í størsta blaðnum Tidningen Åland : "Tað er álvari nú!" Hann sipar til tær treku samráðingarnar við finska statin um eina lagaligari skattalóg fyri sjóvinnuna og til tingingar millum finska statin og Áland um at skipa eina egna álendska skipaskráseting. Men hann staðfestir, at tað kann taka ár, áðrenn nøkur nýggj skipan fæst at virka. Og beint nú hevur landsstýrið ikki nakað boð upp á, hvørji tiltøk ein kann seta í verk, til tess at búgva seg til støðuna eftir 2004.

Leiðarin fyri álendsku deildina av finska sjómannafelagnum heldur, at hetta er spæl fyri gallarínum og ein roynd at trýsta bæði statin og fakfeløgini at geva reiðaríunum betri sømdir.

Helst er útspælið hjá Viking Line í ein ávísan mun politiskt.

Men fyrst og fremst er tað kortini fyrsta tekinið um avgerandi broytingar í búskaparligu umstøðunum og fortreytunum hjá Álandi, ein fyrsta fráboðan um at Áland stendur framman fyri sera torførum buskaparligum tillagingum komandi árini.

**Mikkjal Helmsdal, Áland**





# FØÐINGAR

15 apríl fingu Kristianna Winther Poulsen, Hoyvík og Ingolvur Gunnarson, Glyvrar, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4650 gr.

16. apríl fingu Majbritt og Jón Eli Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

16. apríl fingu Svava og Sjúrður Højgaard, Akureyri, Ísland, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3915 gr.

19. apríl fingu Andrea og Símin Pauli Johansen, Strendur, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3600 gr.

19. apríl fingu Anja og Terje Hansen, Søldarfjørður, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3150 gr.

20. apríl fingu Malan á Svínafløtti og Petur Elias Debes, Miðvágur ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

20. apríl fingu Robin og Ingun Eysturoy, Lambareiði, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

20. apríl fingu Anita Wilhelmsen og Jónhallur Debes, Argir, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3900 gr.

21. apríl fingu Eyð Traber og Magni Durhuus Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

21. apríl fingu Ann Joan Nicolajsen og Magni Reinert, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3400 gr.

22. apríl fingu Trine Krämer og Gunnar Onghamar, Hjørring, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3380 gr.

22. apríl fingu Anja og Vagn í Geil, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

23. apríl fingu Olga Stenholt Aasiaat og Høgni Müller, Saltangará, búsitandi í Aasiaat, eina dóttir. Hon var 49 cm. long og vigaði 3280 gr.

24. apríl fingu Ingrid Poulsen og Jóhan Danbjørg Heinesen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3500 gr.

24. apríl fingu Eyðbjørn og Jóhanna Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

25. apríl fingu Janet Matras, Toftir og Jógvan Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

26. apríl fingu Anja og Vilhelm Tell, Jena í Týsklandi, eina dóttir, ið eitur Elsa. Hon var 53 cm. long og vigaði 3560 gr.

27. apríl fingu Fríðunn Niclasen og Eilif Petersen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

27. apríl fingu Estrid og Fróði Hansen, Sandavágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4200 gr.

28. apríl fingu Birgit og Ingemar Højgaard, Toftir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4900 gr.

# ANDLÁT

19. apríl
**Óli Michael Norðberg,** Hvalba, 74 ár
**Eliesar Hans Evald Nolsøe,** sonur Andrias og Grace Nolsøe, 72 ár
**Rosith From Petersen,** fødd Jensen, Amager í DK. abbadóttir »Sakan« í Sumba, 61 ár
20. apríl
**Malla Andersen,** fødd Egholm í Keypmannahavn, 88 ár
21. apríl
**Hildibjartur í Dali,** skorsteinssópari, van. nevndur Bjartur, 82 ár
22. apríl
**Hanna Knaabe,** búsitandi í Haderslev, fødd Heinesen úr Saltangará, 82 ár
24. apríl
**Petrina Joensen,** Klaksvík, fødd Poulsen, ættað úr Kollafirði, 89 ár
**Hilmar Poulsen,** Argir, 70 ár
25. apríl:
**Amalia Olsen,** ættað úr Hósvík, búsitandi í Havn, 84 ár
26. apríl
**Zacharias Hansen,** Sandavágur, 73 ár
**Trúgvi Olsen**, á Argjaboða, 70 ár

## Silvurbrúdleyp

**Mikudagin 3. mai hava Jóna og Niels Juul Kristiansen, Æðuvík, silvurbrúdleyp.**

**Dagurin verður hildin 6. mai í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma, kunnu tekna seg í seinasta lagi 27. apríl á tlf. 448337.**

# KIRKJUR & SAMKOMUR

## Gudstænastur 1. sunnudag eftir páskir

*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, konfirmatión Sonja Klein
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Bergur D. Joensen
*Hvannasund:* kl. 12, konfirmatión, Meinhard Bjartalíð
*Hósvík:* kl. 11, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, altargangur, Hans Eiler Hammer
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg. Niels Pauli Danielsen
*Funningur:* kl. 11, Konfirmatión Emil Olsen
*Bøur:* kl. 11, David Johannesen
*Rituvík:* kl. 11, konfirmatión Jónsvein Bech
*Sandur:* kl. 11, altarg.,
*Skálavík:* kl. 13 (45 ára konfirmantar) Jákup R. Hansen
*Miðvágur:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Sumba:* kl. 12, (útvarp.) Elsa Funding
*Sandvík:* kl. 12 Ólavur Rasmussen
*Øravík:* kl. 11 P. M. Rasmussen

*Broytt kirkjutíð: Komandi sunnudag 30. apríl verður farið í kirkju kl. 11 í Sandavági, Miðvági, Sørvági, Bø, Selatrað, Eiði og við Norðskála.*

## Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

## KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin 1. mai kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma v/ Petur Jacob Sigvardsen. Evni: Kirkjuviðurskiftini í gomlum døgum.
Týsdagin kl. 16 í KFUK: Várgleði, fyri børn.

## Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 20 bønarskúlin.

## Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla, sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 vitnimøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 21 verður Cafékvøld har Eyðun Jacobsen luttekur við sangi og vitnisburði. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og sunnudagsskúli. Hósdagin og fríggjadagin kl. 06 morgunbøn. Øll eru vælkomin.

## Møtiskrá
fyri Føroyatúr hjá Hera Elttør, trúboðara: 30. apríl: Á Skála.

## Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Knút Larsen.

## Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Gunnar Reynslág o.ø.

## Frelsunarherurin í Havn
Sunnudagin kl. 11 møti, Ruth og Gordon Cocking leiða og tala, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Irena og Eyðun Christiansen luttaka.

## Zion, Kollafjørður
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti við Hera Eltør, trúb. Innsavnan.

## Keldan, Skálafirði
Alpha-legan byrjar leygarmorgunin kl. 09.30, tessvegna einki opið hús leygarkvøldið. Sunnudagin møti kl. 17. Barnamøti kl. 17. http://kort.olivant.fo/~keldan/

## Filadelfia, Gøtu
Leygardagin kl. 16 verður barnamøti, kl. 20 evangeliskur fundur og kl. 22 verður ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 verður møti fyri alla familjuna, børn og vaksin. Svenning av Lofti, Óla Hendrik av Fløtum og Jens Hammer Egholm luttaka á øllum møtunum.

## Missiónshúsið á Tvøroyri
Møti verður leygarkvøldið kl. 20. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og sunnukvøldið kl. 18 er møti. Luttøka norðanfjørs við talu og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Ítróttarhøllin í Klaksvík
Tiltakið sum Heimamissiónin skipar fyri: Sunnudagsskúlin ár 2000 »Eingin er ov lítil til Jesus«, verður sunnudagin 30. apríl kl. 15. Tiltakið er fyri allar Norðuroyggjar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Ungdómshúsið á Eiði
Eingin ungdómsløta verður fríggjakvøldið. Víst verður til felagsungdómsmøti á Glyvrum, leygarkvøldið kl. 20.

## Kirkjan, Norðskála
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

## Samkoman Sion, Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

## Aglow, Suðuroy
Fundur verður í Porkeris skúla leygardagin kl. 16. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

## 1000-ára haldið
Leygardagin 29. apríl kl. 16 letur framsýningin um kirkjurnar í Føroyum upp í skúlanum á Giljanesi. J. P. Gregoriussen, arkitektur hevur skipað fyri og greiðir frá.
Leygardagin 29. apríl kl. 15 heldur Meinhard Bjartalíð, prestur fyrilestur um Grundtvig í kirkjuni á Húsum.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 heldur Marjun Bæk, prestur, fyrilestur um Thomas Kingo í kirkjuni í Bø. Havnarkórið syngur.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 lesur Ebbe Rasmussen, prestur, fyrilestur hjá Axel Tórgarð um Petter Dass í kirkjuni í Hesti. Tórshavnar Manskór syngur.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 verður »Fagnaðarljóð« í Vesturkirkjuni. Andakt verður við Alfred Olsen. VOX v/Ásbjørn Berthelsen, Frelsunarherurin. Sigrid Sivertsen leiðir. Victor Carlsen spælir.

# *Eitt ljós á gøtu míni*



## Páskaboð – 1. leygardag eftir páskir

*»Og reiðiliga árla á morgni hin fyrsta dagin í vikuni koma tær til grøvina, um sólarris. – Og tær søgdu hvør við aðra: Hvør skal velta okkum steinin burtur frá gravarmunnanum«. (Markus 16,3–3).*

Við sólarris komu kvinnurnar út til Jesu grøv til tess at salva likam hansara. Hendan tunggongda leiðin í náttarmyrkri. Hesin hugtungi dámurin, at vísa Meistara sínum tann seinasta heiðurin, – og skilnaðarløta um ævir.

Líka so valdandi myrkrið var langa fríggjadag, tá ið myrkur legðist um alt landið líka til nóns. Líka so hugtungt lagið var í Jesu vinaskara, vónloysi og dapurt lyndi. Líka so kveikjandi og lívsjáttandi hevur hendan løtan hin fyrsta dagin í vikuni verið, tá kvinnurnar komu út til grøvina um sólarris.

Lívsins stóra umskifti hendi páskamorgun. Tá ljóðaðu gleðiboðini snimma á morgni, og sólarljósið krýndi lívið og deyðans leggstað. Hann var risin upp av deyða og grøv. Hin stóri steinurin við gravarmunnan var veltur frá, og trupulleikin tikin burtur. Nú lá leiðin opin inn í grøvina til tess at salva Harrans likam.

Páskamorgun fingu kvinnurnar við Jesu grøv at síggja, at tað tær mettu sum ein stóra trupulleika. Tær sóu, at steinurin var veltur frá grøvini. Tær sóu, at grøvin var tóm. Tær hoyrdu eingilin siga: »Tit leita eftir Jesusi úr Nazaret, hinum krossfesta; hann er risin upp, hann er ikki her«.

So lívsjáttandi ljóðar evangeliið um uppreisn Jesu Krist, og so vælsignað mundi sólarljósið kennast hendan fyrsta morgunin í vikuni. Hann var risin upp av deyða og grøv, hin krossfesti vinur teirra.

»Sum ígjøgnum sorta skýggja / kemur fram hin gylta sól, / so at bølmyrkur má flýggja, / lýsir í um tind og hól«.

Sum tað gekst kvinnunum við grøvina, soleiðis kemur tað eisini at gangast okkum. Páskaundurið er lívsins sanna kelduvað. Har vellur gleðin fram, og har fær hin troytta sálin hvíld eftir stríð og strev. Guð gevi oss at søkja hesa tómu grøv, so at dagsins fyrsta sólarris krýnir trúgv vára. Tá trúgvin verður krýnd av tí upprisna, tá er dagurin altíð lættari, ja sælur, sjálvt um eitthvørt darvandi liggur á vegnum. Amen.